## DAGSINS MEINING

# Virðisbrævamarknaðurin

Tað tykist sum um, at Virðisbrævamarknaðurin í samstarvi við íslendarar skal trumfast ígjøgnum. Hóast ávarandi røddir hava verið frammi bæði frá politiskari síðu og frá privatum, so tykist ikki sum, at man vil diskutera hendan marknað, hóast nógv vandamál eru so at siga óviðgjørd. Hvussu verður til dømis við insidara problematikkinum? Er hetta ein trupulleiki á Københavns Fondsbørs fyri ikki at tala um New York Stock Exchange, so verður hann hvaðna verri í einum føroyskum partabrævamarknaði. Hetta eigur at viðgerast, árenn nakað verður sett á stovn.

Í grundgevingunum fyri at fáa ein føroyskan partabrævamarknað upp at standa er m.a., at tað skal gerast léttari hjá fyritøkum at útvega rakstrarkapital. Er hetta nakað, ið føroysku vinnuni tørvar? Um so er, so er tað løgið, at ongar av fremstu privatu føroysku fyritøkunum eru áhugaðar í at skráseta seg frá fyrstan tíð. Hetta er ein forkláringstrupulleiki, ið eigur at at fáa ávaringarljósini at lýsa, tá tað kemur til motivini fyri ein slíkan partarævamarknað.

Tað hevur verið sagt, at ein fortreyt fyri ein føroyskan virðisbrævamarknað er privatisering av almennu fyritøkunum. Skulu almennar fyritøkur privatiserast á einum virðisbrævamarknaði, sum privata vinnan ikki sjálv vil skrásetast á? Tann dagin feløg sum tildømis Tórshavnar Skipasmiðja, Havsbrún, Skipafelagið Føroyar o.s.fr. vilja skráseta seg á einum føroyskum virðisbrævamarknaði, so kunnu tær gera tað, og so kunnu vit síggja, hvussu ein slíkur riggar í Føroyum. Tað kann ikki verða meiningin, at skattgjaldarans ogn skal brúkast sum royndarkanin til eitt ivasamt eksperiment.

Hvussu kunnu vit vita, at talan ikki verður um eina eingangsrakett, har útsøla verður hildin av almennum ognum, fyri so at stagnera fullkomuliga viðvíkjandi keyp og sølu? Ein fortreyt fyri ein slíkan marknað er, at ein ávís nøgd av transaktiónum skal ígjøgnum hvønn dag, fyri at marknaðurin kann finna eina nattúrliga legu. Ilt er at síggja, hvussu henda nøgdin kann uppnáast í Føroyum, har søgan hevur víst, at føroyingar av siðvenju sita á partabrøvum. Hetta við at keypa og selja uppá stutt sikt hevur ikki ligið til føroyingar, og ilt er at síggja, hví hetta skal broytast nú.

Hví er so umráðandi at fáa ein virðisbrævamarknað nú? Um almennar fyritøkur skulu privatiserast, so kann tað gerast í smáum stigum til dømis eftir uppskotinum hjá Jóannes Eidesgaard, har allir borgarar í landinum fáa partabrøv í fyritøkum, ið teir longu eiga.

Tað er sera óheppið um vit nú fáa eina ivasama loysn við einum partabrævamarknaði, ið kemur at gera meiri skaða enn gagn. Tað finnast einstaklingar, ið eru grammir eftir at sleppa framat aftur fatinum í form av almennum fyritøkum. Um hesar kreftir forma eina alliansu við aðrar kreftir, ið ynskja ein virðisbrævamarknað av meiri naivum nationalum orsøkum, so er grund til stúran, tí eingin av hesum báðum bólkum hevur tíð at steðga á, og taka atlit til samfelagið breiðastu merking. Loypir man framav í hesum máli, so vendst ikki aftur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skelkandi at hoyra Vestergaard

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Ein skilagóður og konstruktivur politikkur í løgtinginum eigur at finna semjur í ØLLUM løgtinginum, so at rækjuflotin, inklusivt okkara nýggjasta rækjuskip, Hviltenni, verður bjargað at fiska undir føroyskum flaggi - og við føroyskari manning vinnur pening til land og fólk.

Seinastu árini hevur politiski myndugleikin vitað, at trupulleikar vóru í rækjuvinnu okkara.

Fiskimálaráðharrin eins og teir undan honum seinastu 5 árini tváa hendur. Onki kann gerast, Tjóðveldisflokkurin sigur nei. Álvaratos. Hvat er hetta fyri nakað. Skal øll rækjuvinnan fara fyri bakka, skip flagga út ella seljast, tí Tjóðveldisflokkurin sigur tað. Tað átti ikki at borið til sum politikkari at sitið afturá, ímeðan ein stór vanlukka hóttir alla okkara rækjuvinnu. Skulu vit missa øll okkara rækjuskip og vinnu til aðrar - fyri lítið og lætt.

Allarminst átti tað at verið møguligt hjá okkara fiskimálaráðharra passivt at hugt eftir, at alt fer í knús, ið er uppbygt í ártíggjur. Stór samfelagsvirði, bæði privat og almenn eru í vanda at fara fyri skeyti, um ikki nakað munadygt verður gjørt NÚ - BEINANVEGIN.

Eitt er uppskot Sambandsfloksins um FAS skipan til rækjuflotan. Tað er eitt gott uppskot.

Men er neyðugt við øðrum tiltøkum til tess at koma úr hesi ódn?.

Eg haldi, at heldur enn at nýta orku uppá yvirtøkur, ið kosta sera nógv, áttu tíð og kreftir at verið nýttar at royna at finna eina skipan, ið gjørdi, at ongin av okkara sjómonnum varð tveittur í land av okkara rækjuskipum, ið tryggja okkum tilfeingi í altjóða sjógvi. Her er talan um stór virðir, ið vit ikki hava ráð at missa.

Víðari eiga okkara skip ikki at vera nýtt at tryggja, at aðrir fáa rættindir - ið vit missa.

At søgur nú ganga, at okkara nýggjasti og besti rækjutrolari møguliga er á veg út úr flotanum, eigur at fáa Vestergaard fiskimálaráðharra at vakna og seta sær spurningin: Hvussu kann ein loysn finnast á trupulleikanum hjá rækjuvinnuni? Og tað skal gerast nú!

Hann er vælkomin at tosa við Sambandsflokkin. Og eg rokni við, at Javnaðarflokkurin eisini er til at tosa við.

Vit orka ikki at síggja at 30 - 40 - 50 ára stríð og slit fer fyri skeyti - tí Tjóðveldisflokkurin sigur nei.

Politikkarin eigur at sýna ábyrgd, og royna at tryggja at stór samfelagsvirðir ikki fara fyri skeytið.

Tí mugu vit gera nakað við okkara rækjuflota - nú.

# Svar til Sonju J. Jógvansdóttir

**Gerhard Lognberg**
*løgtingsmaður*



Sonja J. Jógvansdóttir, blaðfólk á Dimmalætting, hevur grein um tíðindi frá landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum sum var í Hvalba.

Hon skrivar frá fundinum, tað er jú bara positivt.

Men so fer hon at skriva um, hví eg ikki var møttur, og heldur fyri, at hetta ikki at møta, hetta var nokk lyndi í skopuninginum. Hvar ið henda unga kvinna kennur allar skopuningar frá, er sjálvsagt ikki gott at vita.

Tað sum eg kann siga, er at parturin hjá skopuningum hevur ongantíð ligið eftir, hvørki á sjógvi ella landi.

Hvat viðvíkjur at møta upp í tinginum, ella tí nevnd eg eri í, haldi eg sjálvur at mín uppmøting er fyrimyndarlig, so er tað sagt.

Sum borgarstjóri og limur í kommununi síðani 1984 havi eg ongan fund forsømt, so tað man verða í lagi við mínari uppmøting.

Síðani fer blaðkvinnan at viðgera meg, hvat sjúku viðvíkur. Ja góða, tað sleppa hvørki tú ella eg at avgera okkara heilsu. Tú nevnir í greinini, at eg líði av ov høgum blóðtrýsti, eg má siga, at tú hevur stóra umsorgan fyri mær.

Jú, rætt er tað. Tað er nakað, sum hevur plágað meg nógv í nógv harrans ár.

Eisini nevnur tú, at eg ikki hevði sagt frá. Jú Sonja, eg segði frá, at eg ikki fór at møta vegna forfall. Tað má vælsaktans verða í lagi, ella meinar tú, at tað skuldi verði øðrvísi? Tað má tú sjálv um, men eg kundi ikki møta.

Fundurin var fluttur eina viku fram, grundað á, at ein var sum ikki kundi møta vegna forfall, so eg vildi ikki fara og biðja um at flyta fundin einaferð enn, so mikið lítilátin eri eg.

Síðani fer tú at spyrja formann floksins, um eg eri settur út á eitt síðuspor, grundað á onkrar meiningar sum eg havi havt og (havi).

Formaðurin svarar beinrakin, at tað er vítt til veggja í Javnaðarflokkinum.

Til síðst. Kanska kundi tú funnið okkurt meira positivt um mín persón sum løgtingsmaður. Kanska allar tær ferðir eg havi gjørt vart við tær oyggjar eg eri valdur í. Allar teir fyrispurningar eg havi havt, hvat ið Sandoy og Skúvoy viðvíkja.

Annars haldi eg, at hatta var ein lítið sigandi frásøgn frá einum fundi, sum vardi í tveir dagar. Saktans kundi tú funnið okkurt meira positivt.

Kanska formansfrágreiðingina t. d. Har var vælsaktans nógv sera positivt at skriva um.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Dimmalætting á landsfundi í Hvalba

**Jóannes Eidesgaard**



**Tað átti ikki at verið nøkur sum helst orsøk til, at Dimmalætting gevur landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum tað skoðsmál, at hann var merktur av máttloysi, soleiðis sum teirra yvirskrift ljóðar. Veruleikin var beint tann øvugti. »Ongantíð verið á so kveikjandi landsfundi«, var tað fólk søgdu, sum dúgliga hava vitjað landsfundirnar hjá flokkinum gjøgnum árini.**

Í samfull 23 ár hava eg (rithøvundurin) verið á hvørjum einasta landsfundi hjá Javnaðarflokkinum. Hetta hevur verið eitt tíðarskeið, tá tað bæði hevur gingið væl í samfelagnum, og tá tað hevur gingið út av lagi vánaliga. Hetta hevur somuleiðis verið eitt tíðarskeið, har Javnaðarflokkurin hevur sitið á samgongu, og har flokkurin hevur sitið í andstøðu. Vit hava sitið í samgongu og havt leiðsluna, og vit hava sitið í samgongu, og aðrir hava havt leiðsluna. Men ongantíð havi eg upplivað ein landsfund, sum var meira kveikjandi enn hesin, sum vit høvdu seinasta vikuskiftið suðuri í Hvalba.

Tí havi eg sera trupult við at skilja, hví Dimmalætting, sum hóast alt hevði ómakað sær at senda eitt umboð til landsfundin, fær tað burturúr, at hesin var merktur av máttloysi. Eg má her leggja aftrat, at blaðkvinnan hjá Dimmalætting kom fyrst á fundin á middegi leygardagin, tá bert temaorðaskiftið og val av starvsnevnd o.ø. var eftir á skrá. Hon fekk av tí orsøk hvørki frágreiðingarnar og viðmerkingarnar frá feløgunum ella formansrøðuna og aðalorðaskiftið um hana við.

Nú skal ein varða seg fyri at vera ov atfinningarsamur mótvegis fjórðu statsmaktini, men skulu vit politikkarar virða tað, so mugu fjølmiðlarnir eisini royna at bera boðskapin nøkulunda rættan út. Og greinin sjálv, sum greiðir frá landsfundinum, er heldur ikki serliga nógv í samsvar við yvirskriftina. Greinin ella frágreiðingin leggur í staðin rættiliga stóran dent á mín persón og mín leilut og so á leiklutin hjá ávísum tingmanni, sum tíverri ikki var við á landsfundinum. Tað í sjálvum sær er rættiliga løgið, tá hugsað verður um, at hetta var ein landsfundur, sum politiskt sveimaði víða um ítøkilig mál. Men av einari ella aðrari orsøk viðger man heldur tað, sum ikki var á fundinum, heldur enn at viðgera tað, sum veruliga fór fram.

Greinin nevnir tó m.a., »at fundurin var á ein hátt konstruktivur, og nógv mál fingu rættiliga áhugaverda umrøðu. Ítøkiligir loysnir vóru ikki nógvar, men viðkomandi spurningar vóðu settir til eitt nú familjupolitikk, kommunupolitikk og privatiseringar.« Jú, sanniliga vóru eisini ítøkiligar loysnir við í viðgerðini m.a. til fiskvinnupolitikkin, miðfyristingina, pensjónsmálið og familjupolitikkin.

Hví Dimmalætting skal hava nakra sum helst orsøk til at senda henda boðskapin út, sum teirra yvirskrift týsdagin boðar frá um máttloysi, tað veit eg ikki, men eg kann sjávandi gera mær mínar tankar um tað. Og hesir tankar harma meg.

Tríggir flokkar høvdu landsfund um vikuskiftið, og at størsti flokkur nevniliga Javnaðarflokkurin fær minst umrøðu í Dimmu, ja tað mugu vit so liva við, men so átti man at kunna kravt, at tað sum so stóð var so nøkulunda í tráð við veruleikan. Og aftur í blaðnum í gjár vóru umrøður frá hinum báðum landsfundinum og tøgn um Javnaðarflokkin. Tað er so eitt journalistiskt val, og tað skal eg ikki blanda meg uppí. Men hví vit skulu skírast máttloysingar, ja tað lysti meg at vitað.

Nú er tað ikki so long tíð gingin, síðan nakrir flokkar lótu teirra landsfundir upp fyri fjølmiðlunum, sum annars er vanligt í londum rundan um okkum. Men hesin møguleiki hjá fjølmiðlunum forpliktar eisini fjølmiðlarnar til so at royna at fáa rætta samanhangið burturúr. Tað kann væl ikki vera meiningin, at eitt blað í hesum føri Dimmalætting brúkar henda møguleika at mála eina aðra mynd av Javnaðarflokkinum enn hana, sum er.

Eg ætli mær ongan journalist at skjóta, men so má eg eisini kunna krevja, at flokkurin, sum eg eri formaður fyri, ikki verður skotin í staðin. Opinleikin forpliktar báðar vegir.

# Landsstýrismaður vísir álvarsamari skuldseting aftur

**Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, vísir staðiliga aftur, at hann skal hava villleitt Føroya Løgting. Hann harmast um, at tíðindablaðið Dimmalætting setur fram eina so álvarsama skuldseting, sum einki hald hevur í veruleikanum**



TÍÐINDASKRIV
*frá Karsten Hansen, landsstýrismanni*

"Hóast eg havi breiðan rygg, kenni eg meg at hava fingið órímiliga viðferð í hesum máli. Skuldsetingin um, at eg skal hava villleitt løgtingið er álvarsom, men hon hevur einki hald í veruleikanum. Kortini sleppi eg ikki í blaðnum at gera viðmerkingar til skuldsetingina. Dimmalætting letur harnæst eisini lesarum sínum rangar upplýsingar", sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, ið harmast tilburðin.

Hann sipar beinleiðis til eini høvuðstíðindi í Dimmalætting tann 17. november 2003. Í stórt uppsettari forsíðugrein skrivar blaðið, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur villleitt løgtingið í sambandi við eitt lógaruppskot frá 11. november um at leggja avgjald á sodavatn, søtar keks og beriposar. Sambært blaðnum dýrka søtar keks meira, enn landsstýrismaðurin skal hava upplýst fyri løgtinginum.

Niðurstøðan hjá blaðnum er, at landsstýrismaðurin hevur villleitt tingið.

"Hetta er ein skeiv niðurstøða, tí eingin villleiðing er farin fram", sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður.

**Dømir**
Tíðindablaðið skrivar m.a. soleiðis við støði í einum dømi:

"Eitt dømi er ein pakki av Homeblest 200 gr, sum í dag kostar millum 11,95 og 13,95. Hesin pakkin fer 1. januar at kosta millum 19,95 - 22,95 krónur, alt eftir um vøran er keypt frá einum keypmanni ella einari kiosk, um uppskotið verður samtykt í verandi líki".

Upplýsingarnar hjá Dimmalætting stava eftir øllum at døma frá Vinnuhúsinum

Fíggjarmálaráðið hevur fingið upplýst frá Toll- og Skattstovu Føroya, at nevndi pakki av Homblest 200 gr. keks dýrkar áleið 4,70 krónur orsakað avgjaldshækkingini.

Dimmalætting skrivar eisini, at eitt nú sonevndar grønar keks, sum formliga eita Viscount, fara at kosta nærum tvífalt so nógv, eftir at avgjald kemur á tær eftir nýggjár

Toll- og Skattstovu Føroya upplýsir, at ein tílíkur keksapakki dýrkar áleið 3,25 krónur orsakað av avgjaldshækkingini.

Tey veruligu tølini vísa sostatt, at ætlaða avgjaldið ikki dýrkar nevndu vørur eins nógv, og Dimmalætting skrivar. Tann sannroynd, at vørurnar kosta meira, enn Toll- og Skattstova Føroya upplýsir, tá vørurnar liggja til keyps í handlunum, kann landsstýrismaðurin við fíggjarmálum ikki lastast fyri.

**Grov skuldseting**
Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum setir spurnartekin við mannagongdina hjá Dimmalætting í sambandi við forsíðuna um, at løgtingið skal vera villleitt.

"Skuldsetingin um at villleiða løgtingið er hin mest álvarsama, ein landsstýrismaður kann fáa móti sær, og tí havi eg krav uppá at koma til orðanna í greinini. Henda møguleika fekk eg tó ongantíð, og tað er í stríð við góðan fjølmiðlasið. Tað er eisini í stríð við góðan fjølmiðlasiðið, at blaðið ber lesarum sínum rangar upplýsingar", sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður.

Karsten Hansen vísir staðiliga aftur, at hann skal hava villleitt Føroya Løgting.

# Bygdarstevna í Nesvík

**Palli Dalsgaard**
*Skálavík 25.11.03*



Í Sjónvarpinum í kvøld sóu vit brot frá einari samkomu, sum bygdarfólkið í Miðvági høgdu í Leguhúsinum í Nesvík um vikuskiftið. Greitt varð frá, at hetta var triðja árið, hetta tiltak var, og at fleiri og fleiri vóru komin afturat á hvørjum ári. Hetta var sjálvsagt ein stuttleiki at síggja, at so gott samarbeiði kann fáast í lag í einari bygd. Miðvágur er ein stór bygd og vil tað til allar tíðir vera léttari hjá einum stórum plássi at fáa eitt slíkt tiltak til veruleika. Tað, sum gav mær nakað at hugsa um, og vónandi øðrum við, vóru orðini, ið søgd vórðu í samrøðuni, sjónvarpið hevði við kvinnuna, tosað varð við, tá hon segði, at hetta var fyri at koma saman og at **lækka kirkjugáttina**. Vónandi fær bygdarfólkið í Miðvági lækkað kirkjugáttina í øðrum bygdum eisini, so vit vakna úr tí tornurósusvøvni, sum tíverri er í ferð við at taka yvirhond nógva staðni hvat kirkjugongd viðvíkur.

# Kvívíkar kirkja 100 ár

HÁTÍÐARDAGUR
*Tíðindaskriv*

Triðja sunnudag í advent 14. desember 2003 fyllir Kvívíkar kirkja 100 ár.

Hátíðarhaldið byrjar fríggjakvøld 12. desember við at musikkskúlin og skúlin hava framførslur í kirkjuni kl19.

Hátíðardagin verður sum vant guðstænasta við altargongd, har Bjarni Bæk, dómpróstur, prædikar. Skriftarmál er kl.11.40.

Seinnapartin sama dag kl.16.30 verður fjølbroytt konsert við advents- og jólatónleiki. M.a. syngur barnakór í Kvívík. Vestmanna Sangkór syngur saman við sangarum úr Kvívík, og afturvið nøkrum av løgunum spæla tónleikarar úr Musikkskúlanum á floytu, klarinett og fagott. Urguleikari er Heðin Kambsdal.

Kirkjuráðið í Kvívík heldur, at tað hevði verið hugnaligt, um alt kirkjufólkið tann dagin kemur saman til ein døgverðabita í Glæmuni beint eftir guðstænastuna. Tað er bert at boða frá luttøku (hvussu nógv vaksin og børn undir 14 ár) í seinasta lagi á miðdegi fríggjadagin 28. november hjá onkrum av hesum:

Grækaris A. Joensen, fm (42 12 65), Hans Jacob Davidsen(42 12 38), Hans Martin Andreasen (42 11 57), Ninna Joensen (42 12 46), Petra Iversen (42 14 02), Súsanna Joensen (42 13 26).